UTTAN ÚR HEIMI

# Hon vildi ikki reisa seg

**Amerikanska borgararættindastríðskvinnan Rosa Parks er deyð, 92 ára gomul**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 42 ára gamla Rosa Parks gjørdist kend, tá hon ein dagin í desember í 1955 sýtti fyri at reisa seg, so ein hvítur maður kundi fáa hennara pláss í einum bussi í býnum Montgomery. Bussurin vart fullur, so tann hvíti James Blake noyddist at standa, men tað hóvaði honum ikki, so hann bað Rosa Parks og tvær aðrar svartar kvinnur reisa seg, so hann kundi fáa pláss teirra. Tað hevði hann rætt til sambært reglunum, og tvær av kvinnunum reistust. Men Rosa Parks varð sitandi. James Blake sendi boð eftir løgregluni, og tá løgreglan vildi hava at vita, hví Rosa Parks ikki hevði gjørt eftir reglunum, svaraði hon:

– Eg helt ikki, at eg átti at reisa meg. Eg hevði goldið ferðaseðil eins og øll hini.

Tað svarið góðtók løgreglan ikki. Rosa Parks varð tikin, og fýra dagar seinni fekk hon 14 dollarar í bót. Sama dag, sum bótin varð kunngjørd, fóru onnur svørt at seta seg upp ímóti regluni um plássini í bussunum. Oddamaðuir teirra æt Martin Luther King.

Í 1996 varð Rosa Parks heiðrað við fremsta sivila heiðursmerkinum, the Presidential Medal of Freedom, og trý ár seinni fekk hon ein tilsvarandi heiður frá Kongressini. Í sambandi við handanina lýstið Senatið hana sum "eina livandi ímynd av frælsi í USA".



*Rosa Parks*
*Mynd: Reuters*

# Norska sjóverjan slapp ikki at taka trolaran "Elektron"

**Løgregluovastin í Tromsø heldur, at onkur í Oslo forðaði sjóverjuni at taka russiska trolaran "Elektron", sum rýmdi undan sjóverjuskipunum við tveimum norskum eftirlitsamonnum**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fimm norsk sjóverjuskip fylgdu russiska trolaranum, til hann kom inn um russiska markið. Men norsku sjóverjuskipini gjørdu onga roynd at steðga "Elektron", og tað undrar løgregluovastan í Tromsø.

– Slapp sjóverjan at taka russiska trolaran, kundi hon gjørt tað, og so hevði skipið komið í norska havn, sigur Truls Fyhn, løgregluovasti við Aftenposten, men hann vil ikki gera viðmerkingar til, hvør bað sjóverjuna lata russiska trolaran sleppa. Hann leggur tó ikki fingrarnar ímillum:

– Eg eri vísur í, at sjóverjan fekk ábendingar um, at teir politisku myndugleikarnir í Oslo vóru uppi í málinum, og at teir høvdu sína egnu orsøk til at gera tað, sigur Truls Fyhn.

Aftenposten skrivar, at ein orsøk kann vera, at norðmenn og russar skjótt skulu samráðast um fiskiveiðirættindi, og ein onnur kann vera áhugin hjá norskum feløgum at fáa lut í russiska oljuævintýrinum har eysturi í Barentshavinum.

# Fleiri tilburðir av fuglakrími

Myndugleikarnir í Indonesia kunngjørdu í gjár, at ein maður har er deyður av fuglakrími. Sagt varð at maðurin doyði í síðsta mánað, men tað er ógreitt, hví tíðindini ikki koma fyrr enn nú. So seint sum fyri nøkrum døgum síðani funnust fleiri at Indonesia og løgdu myndugleikarnar undir at hava dult fleiri tilburðir av teirri herviligu sjúkuni.

Í gjár frættist úr Kina, at har eru 55 gæs deyðar av fuglakrími, og at myndugleikarnir høvdu givið boð um at avlíva 45.000 aðrar. Fyri einari viku síðani doyðu 2600 fuglar á einum garði í Mongolia, og har vórðu 91.000 aðrir avlívaðir.

## Roynir at keypa veljararnar

Formaðurin í politisku andstøðuni í Italia, Romano Prodi, vil vera við, at Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, ætlar sær at keypa sær sigurin á tjóðartingsvalinum, sum verður í apríl næsta ár.

Í samrøðu við bretska blaðið The Guardian sigur Prodi, at forsætisráðharrin ætlar at brúka meiri enn hálva aðru milliard krónur til valstríðið umframt stuðulin, sum stjórnarflokkarnir fáa frá tí almenna. Prodi vil vera við, at Berlusconi ætlar sær at brúka serliga nógvar pengar í teimum valdømunum, har tað stendur á jøvnum ímillum stjórnina og andstøðuna.

Romano Prodi, sum hevur verið italskur forsætisráðharri fyrr, fær væl størri undirtøku enn Berlusconi í teimum seinastu meiningakanningunum. Valstríðið hevur verið rættiliga hvast. Í samrøðuni við The Guardian sigur Prodi, at tey einastu uppskotini, sum høgrameirilutin í tjóðartinginum hevur samtykt, hava havt til endamáls at lívga forsætisráðharran og vinir hansara.

## Póland fór til høgru

Sunnudagin vann Lech Kaczynski polska forsetavalið, og úrslitið var ein staðfesting av, at polskur politikkur av álvara er snaraður til høgru. Tey bæði valevnini, sum dystaðust í seinna valumfarinum, vóru úr tveimum høgraflokkum, og júst hesir báðir flokkarnir samráðast nú um at skipa stjórn.

Tað eru tvíburðarnir Lech og Jaroslaw Kaczynski, sum toga í teir politisku træðirnar í Pólandi. Jaroslow er formaður í landsins størsta flokki, men hann tók ikki av tilboðnum um at gerast forsætisráðharri, tí tað kundi órógva møguleikarnar hjá bróðurinum á forsetavalinum. Kortini er tað hann, sum verður tann sterki maðurin aftan fyri ta komandi stjórnina, og sostatt fáa teir báðir tvíburðarnir stóra ávirkan á polskan politikk tey næstu árini.

Í nógvum londum hevur forsetaembætið lítlan og ongan politiskan týdning, men í Pólandi er øðrvísi. Har er forsetin ovasti fyri herinum, hann hevur stóra ávirkan á uttanríkispolitikkin, og hann kann sýta fyri at góðtaka lógir, sum tjóðartingið samtykkir.

## Nýggj bók um gloymdar hetjur

Tá týskararnir hersettu Noreg í apríl í 1940, fingu teir serliga harða mótstøðu í Norðurnoregi, og bardagin um býin Narvik hevur serstøðu í norskari søgu.

Tað vóru nú ikki bara norðmenn, sum bardust við týskararnar har, men eisini hermenn, sum teir sameindu settu á land. Soleiðis eitur tað í søguni, men í veruleikanum vóru tað ikki teir sameindu, sum settu hermenninar í land, men heldur smá norsk fiskiog flutningsskip. Í einari nýggjari bók skrivar høvundurein Ivar Enoksen, at ikki færri enn 203 norsk før vóru við til at flyta teir meiri enn 24.000 hermenninar í land í Norðurnoregi. Tað vísti seg, at tey stóru herskipini hjá teimum sameindu vóru ov stór til at fara inn á firðirnar, og tí máttu hermenninir flytast í land í smáum førum.

Ivar Enoksen sigur, at alt ov lítið er gjørt burtur úr bragdinum, sum manningarnar á teimum smáu norsku førunum útintu, og tí hevur hann valt at kalla bók sína "Túsund gloymdir menn".

## Dýr hús

Tað er ikki bara í Havn, at húsaprísurin setir met, tí í Danmark vísa hagtøl, at har hevur húsa- og íbúðarprísurin ikki verið so høgur tey seinastu tíggju árini sum nú.

Tað er serliga í teimum stóru býunum, at prísurin er hækkaður nógv. Í Århus, Keypmannahavn og Frederiksberg er prísurin á eigaraíbúðnum hækkaður 34 prosent tað seinasta árið, og meðalhækkingin fyri alt landið er næstan 25 prosent, skrivar Politiken. Í 2003 kostaði ein eigaraíbúð í Keypmannahavn einar 18.000 krónur fermeturin, men í dag kostar hon 28.000 krónur fyri hvønn fermetur.

Men prísurin er sera ymiskur kring landið. Í summum býum í Norðurjútlandi kosta íbúðirnar bara umleið ein fjórðing av tí, tær kosta í høvuðsstaðnum.